# Nýggjar vónir til føroyska altjóða skipaskráseting

**Ein umfatandi betring av Føroysku Altjóða Skipaskránni (FAS) er eftir øllum at døma á veg og fyri fyrstu ferð fyriliggur í Føroyum ein kanning av hvørji ynski altjóða handilsflotin hevur í sambandi við skipaskráseting**

*Býi Tyril*

Fyri at standa seg í alsamt harðnandi altjóða kapping krevst nógv meira enn hvat tann longu kolldømda FAS (Føroyska Altjóða Skipaskráin) frá 1992 megnar, bæði av greiðum fyrimunum at bjóða altjóða reiðaríunum og av greiðari strategi fyri hvat slag av altjóða skipaskráseting okkara skal vera. Hevur tað ligið lutfalsliga leingi í luftini at verandi skipan má bøtast fyri at føroyingar skulu fáa nakað burtur úr at lata handilsskip skráseta seg hjá okkum, so bendir eisini mangt á at nú er okkurt nýtt í væntu.

Hetta stendur greitt aftan á eina ráðstevnu um altjóða skipaskráseting sum Skeiðsdeildin á Føroya Sjómansskúla fyriskipaði fríggjadagin 29. oktober. Ráðstevnan eydnaðist væl, soleiðis at skilja at fitt av fólki møttu upp til nakrar fyrilestrar sum høvdu nógv ítøkiligt innihald, og fingu frá tveimum landsstýrismonnum greið lyftir og ábendingar um at arbeiðið við at menna okkara altjóða skipaskráseting er komið væl áleiðis og verður tikið í størsta álvara.

Talan er um ein sera stóran altjóða marknað, sum mong meta átti at verið natúrligur heimavøllur fyri føroyingar. Sambært upplýsingar sigla tilsamans góð 30.000 skip á heimsins høvum og umleið helvtin av hesum skipum eru skrásett undir fremmandum flaggi, og enn meira tá talan er um stór skip.

Men flestu royndir við altjóða skipaskrásetingum hava víst seg at miseydnast, eftir øllum at døma av tí orsøk at avvarðandi myndugleikar ikki innsíggja hvørji krøvini til raksturin av eini altjóða skipaskrá í veruleikanum eru.

## Vitan fyriliggur

»Í 1992 fingu vit ta sokallaðu FAS-skipanina,« staðfestu fyrireikararnir frá Føroya Sjómansskúla, Kristin Rasmussen og Sjúrður Guðjónsson, í einum uppleggi til ráðstevnuna. »Henda skipan hevur tó ikki virkað lokkandi uppá útlendskar reiðarar, og tí eru at kalla eingi útlendsk skip í hesi skráseting. Spurningurin er so um vit áttu at slept ætlanini um at fáa útlendskar reiðarar hendavegin – ella um vit skuldu lagt á annan bógv og gjørt eina skipaskráseting og skattaskipan eftir kundans tørvi í kapping við aðrar skrásetingar.«

Júst so. Tað var hetta sum ráðstevnan í Nóatúni snúði seg um.

Fyrstur at røða, aftan á at sjómansskúlastjórin Hans Jóhannes á Brúgv hevði boðið øllum at vera vælkomin, var Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiski- og sjóvinnumálum. Honum næstur Óli Hans H. Olsen, stjóri á Skipaeftirlitinum; síðani Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjamálum; so Kristin Rasmussen, sjómansskúlalærari; og seinast Jan Frits Hansen, undirstjóri í Dansk Rederiforening. At enda var so orðaskifti í umleið ein tíma.

Samanum tikið eru mong samd um at Føroyar hava stórar møguleikar at gera seg galdandi innan altjóða skipaskráseting, um ein meira nøktandi ætlan hesum viðvíkjandi verður løgd. Báðir landsstýrismenninir upplýstu undir ráðstevnuni at ítøkiligar nýskipanir eru á veg; hetta kom frá bæði fíggjarmálaráðharranum, hvat viðvíkur einari tonsaskattaskipan, og frá fiski- og sjóvinnumálaráðharranum, hvat viðvíkur sjálvari lógini um FAS.

Sum nakað ið leingi hevur verið eftirlýst, men sum má sigast at vera grundleggjandi, er nú gjørd ein kanning av hvørji krøv og ynskir reiðarar í ymiskum londum hava í sambandi við altjóða skipaskráseting; í sama høpi fyriliggur ídag ein útgreinað strategi, út frá føroyskum fyritreytum, sum hevði kunnað verðið brúkt sum partur av einum útgangsstøði tá tað í næstum skal stingast út í kortið hvat føroyingar ætla við altjóða skipaskrá. Persónurin aftan fyri hetta er eingin minni enn stjórin á Skipaeftirlitinum, Óli Hans H. Olsen.

## Strategisk fløgg

»Tá ráðstevnan er av, fari eg saman við landsstýrismanninum í fíggjarmálum at taka samanum og seta hol á eina ætlan fyri hvussu arbeiðið kann leggjast til rættis frameftir,« segði Bjørn Kalsø í sínum innleggi, sum snúði seg um hvørjar ætlanir Landsstýrið hevur í sambandi við at fáa útlendsk reiðaravirkir at skráseta teirra skip í tí føroysku altjóða skipaskránni.



*Eg hevði sett prís upp á um tit hövdu kunnað funnið eina arkivmynd av einum stórum farmaskipi, tangaskipi ella líknandi] Útlitini fyri eina kappingarføra føroyska altjóða skipaskráseting tykjast bjartari, nú málið eftir øllum at døma er komið aftur á dagsskrá hjá Landsstýrinum*

Hann segði eisini millum annað at samstarvið millum Skipaeftirlitið og Skipaskrásetingina er ment í seinastuni og møguliga skal mennast enn meira.

»Vit fara at lurta eftir teimum við royndum innan altjóða skipaskráseting og lata teirra royndir og eginleikar koma okkum til fyrimuns og harvið hjálpa okkum at røkka eini niðurstøðu. Fiskimálaráðið hevur ásannað at altjóða skipaskráseting og skipaeftirlit er tengt at hvørjum øðrum, og Skipaeftirlitið og Skipaskrásetingin hava sostatt havt eitt sera tætt samstarv tað síðsta árið, og møguliga fer hetta samstarv at verða styrkt enn meira í framtíðini.«

Bjørn Kalsø segði at enda í sínari framløgu at »ein lokkandi føroysk altjóða skipaskrá« kemur at hava »stóran týdning fyri samfelagið sum heild« og lovaði positiva politiska viðgerð, samstundis sum hann frøddist um ráðstevnuna.

»Tað er hugaligt at Sjómansskúlin av sínum eintingum fer undir eitt átak sum hetta… (…) samstundis sum ein lokkandi føroysk altjóða skipaskrá eisini kemur at hava stóran týdning fyri samfelagið sum heild. Spurningurin er í mínum hugaheimi so áhugaverdur at hann eigur at viðgerast út í æsir – sjálvandi í einum positivum anda.«

Stjórin á Skipaeftirlitinum, Óli Hans H. Olsen, hevur í fleiri ár arbeitt við spurninginum um hvørjar fyritreytirnar eru fyri einari væleydnaðari altjóða skipaskráseting. Frammanundan útbúgvin sum skipsførari, varð hann fyri einum ári síðani liðugur við eina útbúgving sum Executive Master of Business Administration í shipping og logistikki. Hansara Master ritgerð viðgjørdi eina altjóða skipaskráseting í Føroyum, og til sítt innlegg á ráðstevnuni tók hann tann partin ið snýr seg um tey krøvini ið verða sett Skipaeftirlitinum í mun til eina kvalitetsskráseting; haraftrurat tók hann við ta marknaðarkanning hann gjørdi í hesum sambandi.

»Nógv lond hava roynt at gera seg galdandi innan skipaskráseting,« staðfesti Óli Hans H. Olsen, »men tað eydnast hjá teimum fægstu. Nógv av londunum geva sær ikki far um hvørji krøv raksturin av eini altjóða skipaskrá setir. Hetta er sum oftast høvuðsorsøkin til at royndin við skipaskráseting miseydnast. Í farnum árum er skipaídnaðurin vorðin alt meira globaliseraður, og tað verður meira og meira eyðsýnt at reiðarar velja ikki egið nationalt flagg til skip síni longur. Val av flaggi er vorðið ein strategisk avgerð, á sama hátt sum einhvør onnur fíggjarlig strategisk avgerð ið verður tikin av reiðaranum.«

»1. januar 2003 vórðu 30228 skip skrásett í øllum heiminum, 15649 av teimum vórðu skrásett í landinum har eigarin býr, meðan 14579 skip vórðu skrásett undir fremmandum flaggi. Tá hugt verður eftir deyðvektini hjá somu skipum, eru 63,4 prosent av henni skrásett undir fremmandum flaggi. Sostatt eru tað fyri tað mesta tey stóru skipini ið verða skrásett uttanfyri landið har eigarin býr.«

## Sleppa undan skatti

Munur er eisini á skipaskáseting og skipaskráseting, vísti Óli Hans H. Olsen víðari á.

»Tvey høvuðssløg av skipaskráum eru: afturlatnar skipaskrásetingar og opnar skipaskrásetingar. Tær fyrru seta strong krøv til eigaraviðurskifti og manningar á skipum; lond sum Japan og USA hava afturlatnar skrásetingar. Tær opnu skipaskrásetingarnar loyva reiðarum at skráseta síni skip undir einum og hvørjum flaggi, uttan mun til tjóðskap. Skipið og reiðarin skulu einans lúka treytirnar fyri skráseting. Krøv verða ikki sett til tjóðskap hjá manningini, men um førleika. Tær opnu skipaskrásetingarnar arbeiða meira ella minni á altjóða grundarlag og eru nógv ávirkaðar av kappingar kreftunum í ídnaðinum. Opnar skipaskrásetingar kunnu býtast sundur í trý sløg: hentleikafløgg, ætlandi hentleikafløgg og altjóða skipaskrásetingar. Opnar skipaskrásetingar fáa sersømdir viðvíkjandi skatti og avgjøldum.«

Hugtakið ‘óheftur ídnaður’ hevur onkuntíð verið brúkt um skipaskráseting; hetta sigur nakað um hvussu sjóvinnan kann verða viðfarin øðrvísi enn annar ídnaður í landinum vegna tær serligu kappingarumstøðurnar hendan vinna hevur.

»Hentleikafløgg hava sum høvuðsendamál at bjóða reiðarum kappingarførar skrásetingartreytir og harvið við avgjøldum forvinna pening til flaggstatin. Treytirnar eru sera ymiskar, men allar stíla ímóti at geva reiðarum lagaligar treytir, undir hesum at teir ið eiga skipini ikki nýtast at vera borgarar í landinum har skip teirra eru skrásett. Hentleikafløgg verða ofta knýtt at londum har lítið og onki eftirlit er við skipum og onki nationalt lógarverk er sum regulerar trygdina. Her kunnu nevnast lond sum Cambodia, Panama, Tonga oyggjarnar o.o. Sokallað substandard skip eru sum oftast skrásett undir onkrum av hentleikafløggunum. Hentleikafløgg hava verið brúkt í fleiri hundrað ár í sjóferðslusøguni, og orsøkirnar til at tey hava verið brúkt, hava verið sera ymiskar.

Ætlandi hentleikafløgg líkjast nógv hentleikaskrásetingunum, við at tey bjóða somu fíggjarligu fyrimunir sum hentleikafløggini. Flaggstatir uttan fullveldi sum reka sjálvstøðugar skipaskrásetingar, eru eitt nú Bermuda (UK), Isle of Man (UK) og Kerguelen (Frakland). Ætlandi hentleikafløgg eru tjóðskaparfløgg sum brúka lógarverkið hjá landinum tey hoyra til, men bjóða fíggjarligar fyrimunir til reiðarar sum skráseta síni skip í teirra skrásetingum. Onkur av hesum londunum bjóða reiðarum eitt nú fíggjarligar og løgfrøðiligar tænastur, fyri at fáa inntøkur til samfelagið tann vegin. Haraftrurat er skattafrælsi í hesum londum, ið av OECD verða nevnd ‘tax havens’.

Av altjóða skipaskrásetingum kunnu nevnast NIS, DIS og aðrar. Skipini í hesum skrásetingunum fáa ásetingar um strangar tekniskar reglugerðir, og eru ofta mannað við fólki úr flaggstatinum; hinvegin hava tey loyvi til at verða mannað við útlendingum. Skipini í hesum skrásetingunum fáa sersømdir í mun til skipini í vanligu skrásetunum, við at tey í ávísum førum sleppa bíligari ella heilt undan at gjalda skatt, ella koma undir serskattaskipan. Slakað verður í manningarkrøvum soleiðis at manningar ið lúka altjóða minstukrøv til førleika, sleppa at manna tey. Orsøkin til at altjóða skrásetingarnar verða settar í verk, er at hesar kunnu forða fyri at skip sum eru í vanligu skrásetingunum verða sett undir annað flagg av reiðaranum, fyri at gerast meira kappingarfør.«

## Á hvíta lista

Hvat lógarverki viðvíkur, vísti Óli Hans H. Olsen millum annað á at altjóða konventiónir verða gjørdar fyri at harmonisera reglur fyri skip og sjómenn í tí globaliseraðu sjóvinnuni; fyri at fáa sett altjóða reglurnar í verk, er neyðugt at stjórnin í flagglandinum ratifiserar konventiónirnar.

»Hóast fleiri flagglond gera reglur ið líkjast krøvum í konventiónunum, verða hesar reglur ikki roknaðar við av fleiri orsøkum. Týdningarmesta orsøkin er at harmonisering av altjóða regluverkinum ikki er veruleiki. ILO konventiónirnar vísa til allar sjómenninar umborð; tað ber ikki til at gera mun á sjómonnum, tá tær verða fylgdar.

Til tess at lúka krøvin sum kvalitetsskráseting skal flagglandið hava orku til at seta í verk altjóða reglugerðir og skipa fyri at flaggið liggur á hvíta lista í hagtølunum hjá Port State Control; eisini má flagglandið tryggja at skipini sigla trygt; harafturat má flagglandið hava orku til at skipa fyri at Sjóvinnubrøv ið verða útgivin av flaggstatinum lúka STCW standardir, og at útlendskar manningar á skipunum lúka krøvini til førleika; eisini má landið hava greiðar mannagongdir ið tryggja at skipið lýkur altjóða krøv, áðrenn tað verður skrásett; tað má tryggja sær at ognarviðurskiftini eru greið; tað má fylgja standardunum í STCW konventiónini; og tað má ratifisera IMO og ILO konventiónir. Og fyri at kunna fylgja við og fáa ávirkan á regluverkið, er neyðugt at flagglandið luttekur í altjóða tjakinum um ásetan av reglum.«

Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri, greiddi í sínari framløgu millum annað frá tí ætlaðu tonsaskipan sum væntandi í næstum fær politiska viðgerð.

»Samanumtikið kann sigast at ein tonsaskattaskipan er neyðug, og verandi FAS skipan má broytast; vit skulu samanlagt hava kappingarførar reglur, og endamálið er at skapa virksemi - so koma inntøkurnar!«

Kristin Rasmussen frá Sjómansskúlanum vísti í sínari framløgu á at sjóvinna, ólíkt fiskivinnu, er í veruleikanum ein tænastuvinna, og at globaliseringin í løtuni gevur føroyingum eitt serligt høvi til at menna og marknaðarføra eina altjóða skipaskráseting.

»Tað serliga við einari tænastuvinnu er jú at hon krevur lítla ella onga ráværu,« segði hann, »hartil kemur at nógvir medarbeiðarar eru beinleiðis í kontakt við kundan, nógvar avgerðir verða tiknar í samstarvi við kundan, og atferðin hjá medarbeiðarunum ímóti kundanum er ein partur av veitingini.«

Tann seinasta framløgan var tann hjá Jan Frits Hansen frá Danmarks Rederiforening. Hann greiddi í stuttum frá um ta sera væl eydnaðu donsku sjóvinnuna, og um hvørji krøv reiðarar seta til lóggávuna í einum landi sum vil taka lut í altjóða kappingini um skráseting av skipum.

»Fyritreytirnar snúgva seg í stuttum um kappingarførar reglur, stabilar karmar, heilhugaða langtíðar ætlan, og dupultskattaavtalur.«



*Bárður Nielsen, landsstýrismaður í sjóvinnu- og fiskivinnumálum, lovaði positiva viðgerð av málinum um altjóða skipaskráseting*

*Foto: Jens Kristian Vang*



*Fleiri kend andlit vóru at siggja á ráðstevnuni um altjóða skipaskráseting; í miðjuni Hans Jóhannes á Brúgv, stjóri á Føroya Sjómansskúla*

*Foto: Jens Kristian Vang*